

**HARA**

*Harumenninir í Heimhaga eru Ólavur Reinert, Annfinn Reinert, Johannes Reinert, Rólant Reinert og Herleif Hammer*



# Nógv hara í ár

## Fyrsta harudagin skutu fimm menn 45 harur í Heimhaga í Norðradali

Randi Jacobsen

Týsdagin, 2. november var fyrsti harudagur, og av tí at líkindini um morgun vóru góð, vóru fleiri henda dagin í haganum og skutu harur.

Millum teirra vóru fjallmenninir í Heimhaga í Norðradali, soleiðis sum tað er í øðrum høgum eisini. Í áravís hava fjallmenninir havt hagan sum haruhaga.

Væl bar til henda dagin hjá teimum. Teir vóru fimm menn og fingu samanlagt 345 harur.

– Ættin var annars ikki góð, og út á dagin fór at regna. Hevði tað ikki verið, høvdu vit óivað sæð væl fleiri harur, sigur Annfinn Reinert, ein av harumonnunum.

Fleiri staðni siga tey frá nógvari haru í ár.

Hann sigur, at teirra hagi er ein góður haruhagi. Og betri er, um kavin liggur, tí høgættin rekur harurnar suðureftir.

Besti dagur, sum hann veit um, var í 1978. Tá fingu fýra menn 70 harur.

Vanliga fáa teir 80-100 harur um árið.

Ymist er, hvussu ofta teir eru eftir harum, og tað er fyri taá mesta bara fyrsta dagin, at allir eru við.

---

# Ein sjáldsom listakvinna

## Leygardagin læt upp stór framsýning í Listaskálanum við málningum og tekningum eftir Fridu Zachariassen. Samstundis kom út bók, sum Malan Marnersdóttir hevur skrivað um listakvinnuna



**LIST**

*Malan Marnersdóttir hevur skrivað bókina um Fridu Zachariassen*

Randi Jacobsen

Nógvir føroyingar hava ongantíð hoyrt um listakvinnuna Fridu Zachariassen, sum búði í Klaksvík. Flestu klaksvíkingar hava tó í hvussu er sæð verk hennara, tá ið teir hava havt ørindi eitt nú í sparikassanum ella í sjúkrakassanum.

Nú er so ein framsýning við einum úrvali av málningum og tekning hennara at síggja í Listaskálanum.

Frida Zachariassen kann sum listakvinna ikki sammetast við nakað annað listafólk í Føroyum. Hon byrjaði at mála naturalistiskt, men fann seinni sín egna stíl.

Tað var eitt stórt arbeiði hjá Listaskálanum at finna fram til, hvar myndirnar hjá Fridu vóru, men við góðari hjálp frá Norðoya Listafelag, skyldfólkum hennara og øðrum fólkum, við vitan um føroyska list, eydnaðist at fáa savnað myndir, sum allar eru læntar til framsýningina.

Tá ið framsýningin læt upp leygardagin, var móttøka, har Steintór Rasmussen, bróðursonur Fridu Zachariassen sang tveir sangir, sum hóskaðu til høvið, og Malan Marnersdóttir greiddi frá um Fridu Zachariassen og um hennara list.

Frida Zachariassen arbeiddi á skrivstovum í Klaksvík, í nøkur ár búði hon í Danmark, og hon ferðaðist altíð nógv. Hon var á tekniskeiði nakrar ferðir, og hon fylgdi eisini einum bretskum brævaskeiði í tekning.

Tað hevru undrað mong, hví Frida Zachariassen hevur verið so burturgloymd sum listakvinna. Summi gita, at tað kom av, at hon búði í Klaksvík, burtur frá listafólkaumhvørvinum í Havn. Ein orsøk kann vera, at hon var kvinna, og onkur nevnir, at Frida Zachariassen var ein kvinna, sum ikki legði fingrarnar ímillum og tordi at siga sína hugsan eitt nú í lesarabrøvum. Malan Marnersdóttir nevndi í røðu síni, at tað neyvan var av tilvild, at Frida Zachariassen helt seg burtur úr Klaksvík, tí í læknastríðið leikaði upp a tað harðasta í 50-árunum.

Bókin um Fridu Zachariassen hevur bæði føroyskan, danskan og endkan tekst.